TIPS

LAGT TIL RÆTTIS: Inna Törnroos

# Barnsligt á internet

NÚ JÓLAGÁVURNAR SKULU KEYPAST ER IKKI NEYÐUGT AT FARA ÚT UM DYRNAR. FØROYSKIR **INTERNETHANDLAR** HAVA STÓRT ÚRVAL AV **BARNATINGUM** OG KLÆÐUM. VIT HAVA VERIÐ INNI OG HUGT, OG VALT TAÐ LEKRASTA TIL TEY SMÁU.



**kulgel.com**
Stuttlig fløskubust, framleidd uttan skaðilig evnir.
27,50 kr.



**smartis.fo**
Inniskógvar. Bundnir og tøvdir inniskógvar av føroyskari ull. Vel ímillum 15 og 16 cm langan fót.
130 kr.



**barnalund.com**
Pediped skógvarnir eru yndismerki hjá fleiri Hollywood-stjørnum. Skógvarnar kunnu brúkast uttandura eins og innandura.
260 kr.



**smartis.fo**
Svimji og fjørðuskógvar úr behagiliga tilfarinum neopren og hava tjúkkan gummibotn sum verjir fótin sera væl.
179 kr.



**barnalund.com**
Smart vetrardrakt frá Hummel Kids. 100% Nylon Oxford. Húgva og vøttir fylgja við draktini
799 kr.



**barnalund.fo**
»Pack & Go« regnjakkin er frá tí danska merkinum Ida T. Hann er úr nylon og kann pakkast niður í ein snarláslumma í rygginum so hann blívur til eina tasku.
150 kr.



**barnalund.com**
Fleece hettujakki frá Nova Star til gentuna. Við reyðum kantum og strípútum fóðri. Jakkin hevur lummar frammanfyri á búkinum, og hol til tummulin.
350 kr.



**barnalund.com**
Smarts er veggjaprýði, ið er gjørt til pinkubørn. Set Smarts upp á veggin beint við vøgguna/seingina ella skiftiborðið.
230 kr.



**einglabassin.fo**
Smartur kjóli frá Katvig. Brúnur og hvítur. 100 % bummull.
399 kr.



**fjas.fo**
Snarláshjálpari. Tá ið børn byrja at duga at lata seg í, hava tey ofta trupulleikar við snarlásum. Um tú hevur ein snarláshjálpara í snarlásinum verður uppgávan nógv lættari. 10 stk í hvørjum pakka. Fáast í ymiskum litum.
125 kr.



**kulgel.com**
Smartur suttusnórur. Snórurin hevur clips, so hann kann verða festur í klæðini hjá barninum.
69 kr.



**fjas.fo**
GUMLO suttan við navni og verndarhettu, so suttan kann leggjast í jakkalumman ella taskuna hjá mammu ella pápa – uttan at hon gerst ólekkur av lummaull. Tríggjar suttur í hvørjum pakka
Einslittar 100 kr.
Blandaðan lit 110 kr.



**kulgel.com**
Heildrakt við grønum súreplum frá Småfolk. 50% bummull, 45% modal og 5% elasthan.
170 kr.



**fjas.fo**
Hondbundin húgva, sum hoyrir til føroyska mannfólkabúnan, ella er ein bundin útgava av kýsanum til kvinnubúnan. Fimm ymiskir litir til hvørt kynið.
185 kr.



**Fjas.fo**
Tøjblæður við barnsins navni á. Tilfar: 100% vevað bumull. Stødd: 70 x 70 cm.
Ein fyri 29 kr.
Tiggju fyri 250 kr.



**kulgel.fo**
Puslitaska frá Gaia og Ko. Taskan hevur magnet-punkt-afturlating umframt snarlás, boks til vátservíettar, pusliundirlag, avtakiliga akslareim, vátrúm, karbinkrók til hanga lyklarnar í, so teir ikki enda niðast í taskuni, lummar til blæur og annað sum til hoyrir.
599 kr.